# Havstovan søkir eftir
# kokki til Jákup Sverra




## Søkt verður eftir kokki til havrannsóknarskipið Jákup Sverra at byrja í februar 2023

**Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til:**


**Erling í Liða**
*Reiðari*

erlingl@hav.fo
tel. 793901


Starvið fevnir um matgerð, proviantering, reingerð v.m.

Havstovan leitar eftir kokki, sum tilvitað og við nærlagni kennir týdningin av heilsugóðum og fjølbroyttum máltíðum, og á henda hátt ger sítt til at tryggja trivnaðin umborð.

Tað verður væntað, at tú viðvirkar til at skapa eitt gott arbeiðsumhvørvi við tínum blíðskapi og góðu samstarvsevnum.

**Setanartreytir:**
Sjóvinnubræv sum kokkur krevst.

**Lønar- og setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsfelagið.

**Umsókn**
Skrivlig umsókn við CV, avriti av prógvum og møguligum ummælum skal vera Havstovuni í hendi í seinasta lagi týsdagin **3. januar 2023**.

Umsóknin skal sendast við telduposti til ***starv@hav.fo*** - frámerkt **'Starv'**.

**Lýsing av Jákup Sverra**
R/S Jákup Sverri
Tórshavn

Skipaslag: Havrannsóknarskip

Manningin telur millum 8 og 13 mans, alt eftir slag av túri. Harumframt eru altíð starvsfólk frá Havstovuni við umborð á kanningarferðunum.

HAVSTOVAN
FAROE MARINE RESEARCH INSTITUTE


P.O. Box 3051 · Nóatún 1
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel +298 35 39 00
hav@hav.fo
www.hav.fo